# Morgan jubileumsbilar





*Jubileumsbilurin Morgan Aero SuperSport er tann flottasti Morgan, sum higartil er gjørdur*

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hundrað ára stovningardagurin hjá Morgan Motor Company hevur rættiliga sett ferð á søluna av Morgan bilum.

Í sambandi við 100 ára føðingardagin vórðu í fyrstu atløgu 100 sergjørdir Morgan Aeromax gjørdir, men tað vísti seg, at eftirspurningurin var so stórur eftir bilinum, at avgerð varð tikin um at gera nakrar Aero SuperSport, sum er ein uppaftur frekari útgáva av Aeromax jubileumsbilinum.



Bilurin hevur t.d. takpanel, sum kunnu takast av, soleiðis at hann bæði kann vera coupé ella opin sportvognur. Motorurin er ein 4,8 litra V8 frá BMW við 367 hk og snúningsmomenti upp á 490 Nm við 4.300 snún/min. Hann koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,5 sekund. Eins og Aeromax verður Aero SuperSport eisini gjørdur í avmarkaðum nøgdum.

# Føroyar áhugaverdar



*Peter Holm og Johannes Jensen til Morgan framsýningina*

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í ár hava verið nokk so nógv útlendsk ellisakfør í Føroyum. Fyrr í ár vóru t.d. nakrir BMW Isetta og nú er danski Morgan-klubburin her við 22 bilum. Mánadagin 21. september koma limir í Dansk Veteranbil Klub til Føroyar við ellisakførum. Eisini hava onkrar motorsúkkluvitjanir verið.

Peter Holm, stjóri á Smyril Line og Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum, siga, at tað vísir seg, at áhugin er vaksandi fyri at koma hendan vegin við ellisakførum. Tað eru so nógvir slíkir felagsskapir í Evropa, og teir fara at leggja seg eftir at fáa ymiskar bólkar at koma hendan vegin.

Føroyar eru eitt spesielt land at vitja. Vit hava góðar vegir og flotta náttúru, eins og tað er lætt at koma úr Danmark til Føroyar við bili, siga Peter Holm frá Smyril Line og Johannes Jensen frá Hotel Føroyum.



*Hesin frá 1959 er tann elsti Morgan á framsýningini*



*Mánadagin vóru allir teir 22 Morgan bilarnir á Skálatrøð*



*Nakrir av Morgan bilunum hava fýra sitipláss*

## Morgan vitja Føroya Ellisakfør

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Áðrenn ferðalagið við teimum 22 Morgan bilunum fer av landinum aftur hóskvøldið 17. september eru tey boðin til kaffi hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond hósdagin kl. 17. Har verður høvi at síggja allar Morgan bilarnar, áðrenn teir fara av landinum.

